Landaplágur allan vegin

Tá Boney M fer á pallin, so heldur manningin seg til allar teir kendu sangirnar frá byrjan til enda. — Teir eru ikki torførir at syngja og verri enn so altíð líka avbjóðandi, men tað eru teir sangirnir, ið fólk vilja hoyra, siga limirnir í Boney M

SAMRØÐA
Heri á Rógvi

Manningin hjá Boney M á vitjanini í Føroyum f.v. Kelly Rahman, Zara Martin, Toyin Adekale og Maizie Williams, ið hevur verið við frá byrjan. Tey lova at allir teir kendu – og bara teir – sangirnir fara at verða spældir í Føroyum.

Mynd: Jens Kristian Vang.a

Okkurt serligt er við at skula gera eina samrøðu við Boney M. Hesin her bólkurin, sum er á einari fløgu í bilinum, og sum meira enn so kann hoyra í útvarpi ella úti millum fólk. Sagt verður, at tingini henda nøkur ár aftaná í Føroyum. Tað var ein tíð, tá limirnir í Boney M vóru stjørnur og lógu ovast á tónatindunum í Bretlandi og Týsklandi. Hetta var afturi í sjeytiárunum.

Allíkavæl er tað okkurt serligt, tí talan er hóast framvegis um Boney M. Um ikki annað so navnið, og sangirnir hanga við.

Sangirnir eru eisini hetta serliga slagið av tónleiki, sum tykist mestsum ódoyggjandi í Føroyum. Tað er nakað við sjeytiárunum og útvaldum, sum fær føroysku fjøldina at smelta. Um tíggju ár vilja vit mest sannlíkt enn hoyra Rivers of Babylon og allar hinar.

Stór útskifting

Nøvnini á teimum fýra, ið manna bólkin í Føroyum, eru: Zara Martin, Toyin Adekale, Kelly Rahman og Maizie Williams. Henda seinasta hevur verið við í bólkinum frá byrjan. Kelly Rahman er mannliga ísletti í bólkinum.

Søgan hjá Boney M byrjar í 1975. Tær skrivligu keldurnar, vit hava leitað upp á alnetinum, vísa frávik í støðum, so eitt ávíst fyrivarni má takast.

Í øllum førum eru øll samd um, at maðurin aftanfyri Boney M er Frank Farian. Hann er týskari og hevur starvast sum bæði framleiðari og sangari. Mest heppin hevur hann verið sum framleiðari. Hann hevur arbeitt saman við so kendum fólkum sum Toto og Stevie Wonder, og so var tað eisini hann, sum stóð aftanfyri Milli Vanilli, ið onkur kanska minnist.

Hann gav í 1974 ein sang út í Týsklandi, sum gjørdist ógvuliga væl umtikin, men sjálvur helt hann seg ikki framat at syngja og framføra, og hann setti tí ein bólk saman. Hesin bólkurin kom at eita Boney M.

Herfrá verður søgan eitt sindur innviklað, men tað stutta av tíð langa er, at bólkurin byrjaði av álvara at fóta sær í seinnu helt av sjeytiárunum. Í stórheitstíðini hjá bólkinum taldi manningin umframt Maizie Williams: Liz Mitchell, Marcia Barret og mannligi limurin kallaðist fyri Bobby Farrell. Tey eru ættaði úr Jamaika og Vest Indisku oyggjunum.

Fyri hesari manningini gekk tað slag í slag við sangum, sum komu at liggja um ovastu rókirnar á tónatindunum. Bólkurin hevur serliga verið væl umtóktur í Týskland og fyri ein stóran part eisini í Bretlandi.

Løg sum Ma Baker, Synny, Rivers of Babylon, Brown Girl in the Ring og Mary's boy child gjørdist øll stór "hit" í Bretlandi. Rivers of Babylon, sum varð givin út saman við Brown Girl in the Ring í 1978, er mest umtókti sangurin hjá bólkinum. 1978 gjørdist eisini besta árið hjá bólkinum.

Við sjeytiárunum fór eisini populariteturin hjá bólkinum. Bólkurin var framvegis væl umtókur í Týsklandi, men bretar kendu ikki nógva trongd eftir Boney M og teirra tónleiki. Boney M gjørdist ongantíð nøkur ævintýrsøga í USA.

Í 1982 fór mannligi sangarin úr bólkinum, og í 1986 valdi bólkurin at gevast.

Síðani tá eru fleir royndir gjørdar at endurstovna Boney M til fleiri ymisk høvi við rættiliga nógvum ymiskum manningum. Eisini hevur upprunaliga manningin verið savnað til eitt høvið.

Sambært einari heimasíðu eru tað nú tríggjar ymsar manningar, sum ferðast kring knøttin undir navninum Boney M.

Boney M hevur millum ár og dag givið eina øgiliga rúgvu av bondum, plátum og fløgum út. Eitt tað mest kenda í Føroyum er mestur jólaplátan hjá bólkinum. Hendan – eins og nógvar aðrar – eru vorðin endurútgivin og miksað fleiri ferðir. Bólkurin hevur eisini givið eina longri røð av uppsamlinsplátum út. Onkur av hesum hevur fingið góða móttøku. Samanlagt er sølan hjá Boney rættiliga drúgv.

Manningin, ið er á vitjaní Føroyum hevur verið saman í átta ár. Tann eina, Zara Martin, er við avloysari á Føroyatúrinum.

– Síðani tann originala manningin fór hvør til sítt, so helt eg ein steðg. Eg varnaðist tó skjótt, at tað var ein eftirspurningur, og spurdi tí hinar, um tær ikki vildu vera við í bólkinum, greiðir Maizie Williams frá.

Maizie Williams hevur verið við í Boney M frá byrjan. Tað eru 27 ár síðani, at bólkurin byrjaði sitt virksemi.

Mynd: Jens Kristian Vang.

Landaplágur

Tá spurt verður eftir, hvat vit kunnu vænta okkum av teimum, so skal eingin vera bangin fyri, at hann fer avstað aftur, uttan at hava hoyrt ein kendan sang. Øll hittini verða spæld slag í slag tann góða tíman, ið bólkurin fer at standa á pallinum.

– Teir eru ikki torførir at syngja og verri enn so altíð líka avbjóðandi, men tað eru teir sangirnir, ið fólk vilja hoyra, siga tær tríggjar kvinnurna við ein munn.

– Eg vildi gjarna roynt okkurt annað, men vit kunnu sanniliga fáa tað at bera til. Hesin tónleikurin riggar til allar aldursbólkar, sigur Toyin Adekale.

– Virðislønina fáa vit frá áhoyrarunum, siga tær.

Sangirnir frá sjeytiárunum hava fingið eina yvirháling, so teir hóska seg betur til 2002. Á konsertini verður tónleikurin playback

Konsert leygarkvøldið

Sum nevnt er Boney M komin til Føroya fyri at spæla. Leygarkvøldið verður stór konsert í Mentunarhúsinum í Fuglafirði. Fríggjakvøldið spælir bólkurin eisini eina eyka konsert í Platform í Havn.

Havgrímur Johannesen, stjóri fyri Platform, hevur fingið bólkin hendavegin, og hann sigur, at tað leingi hevur verið ætlanin at finið hendur á bólkinum, og nú skuldi tað so vera.

Limirnir í Boney M á føroyaferðini siga, at tey spæla eini 10-12 ferðir um mánaðin. Tað eru øll sløg av spælistøðum.

– Vit spæla alt frá ítróttarvøllum við fleiri túsund áskoðarum til privatar veitslur, siga limirnir í bólkinum.

Áðrenn tey komu til Føroya, høvdu tey hoyrt um staðið, men væntaðu ikki tað stóra.

– Vit høvdu ikki roknað við nøkrum, men tá vit so komu vaknaðu vit veruliga, tí hetta landið er so sermerkt, ljóðar tað frá teimum.

Boney M fer í eldin leygarkvøldið í Fuglafirði, og tey leggja longu leiðina avstað sunnumorgunin.

Rætting

Í einum myndateksti í greinini um uppflytingina hjá AB er nakað komið skeivt fyri. Formaðurin í AB eitur Tórálvur Stenberg og Johan Stenberg, maðurin á myndini við blómunum, er sonur bróður Tórálvs, Hans Jacob Stenberg.

Jørgen hevur fundast við kanadiska fiskimálaráðharran um Grand Bank

– Sum útgangsstøði, segði Robert G. Tribault seg vilja vera positivan fyri at fáa eina loysn, sum báðir partar kunnu liva við, sigur landsstýrismaðurin. Ítøkiliga úrslitið av fundinum var, at føroyska og kanadiska sendinevndin hittast sunnudagin, sum fundurin í NAFO verður mánadagin

FISKIVINNA
Vilmund Jacobsen

Jørgen Niclasen er væl nøgdur við samrøðuna, hann í vikuni hevði við kanadiska fiskimálaráðharran, Robert G. Tribault

Í hesi vikuni hava Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fiskivinnumálum og kanadiski fiskimálaráðharrin, Robert G. Thibault, havt telefonfund, har teir serliga tosaðu um føroysku rækjurættindini á Grand Bank og á Flemmish Kap.

Umframt Kanada, eru 15 lond limir í NAFO, ið umsitir fiskirærættindini á hesum leiðum. Kanada, sum eigur meginpartin av Grand Bank, fær 5.000 tons av samlaðu kvotuni, meðan øll hini 15 londini, ið eftir eru, fáa 1.000 tons í part, sum sambært avtaluni verða býtt javnt millum londini. Hetta gevur 67 tons av rækjum til hvørt landið, og tá ið Føroyar og Grønland verða roknaði sum eitt land, er ikki nógv at býta millum londini.

Hetta eru føroyskir myndugleikar og føroyska rækjuvinnan ógvuliga misnøgd við, tí tey halda, at søguligu rættindini hjá okkum eiga at røkka til størri kvotu enn hetta.

– Vit hava tí kravt at fáa ein størri part av rættindunum á Grand Bank, sigur Jørgen Niclasen, landsstýrismaður.

Hann vísir á, at tá ið føroyskir myndugleikar løgdu trýst á kanadisku myndugleikarnar og søgdu seg umhugsa at áseta egnu kvotu, avgjørdu kanadisku myndugleikarnir at steingja havnirnar fyri føroyskum skipum.

– Hóast vit ikki hava givið føroyskum skipum loyvi at fiska uttan um ásettu NAFO-kvotuna, hava kanadiarar prógv fyri, at skipini kortini hava fiskað. Hetta hevur gjørt okkara samráðingarstøðu truplari, sigur landsstýrismaðurin.

Soleiðis er Jørgen Niclasen eisini vitandi um, at kanadiski fiskimálaráðharrin ikki hevur umtalað hesi stig hjá føroyskum skipum við positivum orðum í kanadiskum fjølmiðlum.

Telefonfund við Robert G. Tribault

Nú undan fundinum í NAFO, sum byrjar í Spaniu mánadagin komandi, hava føroyskir og kanadiskir embætismenn tosað saman um støðuna, og hesar samrøður førdu í hesi vikuni til, at telefonfundur varð avtalaður millum Robert G. Tribault og føroyska starvsbróðurin, Jørgen Niclasen.

– Vit tosaðu saman hósdagin. Eg legði fyri við at greiða frá okkara søguligu viðurskiftum á Flemmish Kap og Grand Bank. Eg greiddi honum frá okkara fiskiskapi á hesum leiðum gjøgnum árini og vísti á, at vit hava hildið okkum til tær reglur, sum hava verið galdandi. Somuleiðis vísti eg á, at vit í flestu førum hava stuðlað uppundir sjónarmiðini hjá Kanada í NAFO.

Yvirfyri Roberti legði Jørgen dent á, at Føroyar eru eitt land, sum bara livir av fiski. Tí er eisini neyðugt hjá okkum at halda fast um tey søguligu rættindi, vit halda okkum eiga.

– Eg greiddi frá, at vit halda okkum eiga stór søgulig rættindi á Grand Bank og halda tí, at hesi eiga at hava eina ávísa vekt, tá ið kvotur verða tillutaðar. Jørgen duldi ikki, at føroyingar kendu seg ógvuliga vónsviknar, tá ið allar grundgevingar vórðu feiðaðar av borðinum á eykafundinum í NAFO, sum var í Helsingør í januar.

– Hesum kunnu vit slett ikki liva við, legði eg dent á.

Størri forstáilsi

Landsstýrismaðurin sigur, at so hvørt, sum samrøðan millum hann og kanadiska fiskimálaráðharran leið, var reaktiónin í hinum endanum meira og meira positiv.

– Robert segði seg hava fingið ta fatan, at føroysk skip gjørdu júst sum tey vildu á Grand Bank, men hesum vísti eg aftur og segði, at landsstýrið hevði vent sær ímóti hesum fiskiskapi.

Jørgen sigur, at samrøðan millum partarnar endaði við, at Robert lovaði beinanvegin at taka upp samband við kanadisku sendinevndina, sum fer á NAFO-fund í Spaniu nú mánadagin, og hann lovaði eisini, at søguligu rættindi føroyinga skuldu vigast neyvari í samband við kvoturættindini á Grand Bank.

– Sum útgangsstøði, segði Robert seg vilja vera positivan fyri at fáa eina loysn, sum báðir partar kunnu liva við.

Landsstýrismaðurin sigur, at ítøkiliga úrslitið av telefonfundinum var, at føroyska og kanadiska samráðingarnevndin skal hittast á fundi í Spaniu dagin fyri ársfundin í NAFO.

– Hvat fer at spyrjast burtur úr hesum, er ilt at siga frammanundan, men vit vóna, at funnin verður ein loysn, sum vit kunnu liva við, sigur Jørgen Niclasen at enda. Samráðingarleiðari hjá føroysku sendinevndini á NAFO-fundinum í Spaniu verður Andrass Kristiansen.

At enda kunnu vit skoyta uppí, at við seinastu samráðingar vórðu fiskidagarnir hjá føroyskum rækjuskipum á Flemmisk Kap øktir úr 1440 upp í 1600 dagar.

Ikki ansjósir, men prikkafiskur

Russar hava veitt 7.000 tons av prikkafiski undir Føroyum í ár

FISKIVINNA
Vilmund Jacobsen

Týsdagin, 10. september, hevði tingmaður Javnaðarfloksins, Hendrik Old, ein munnligan fyrispurning á løgtingi.

Løgtingsmaðurin spurdi Jørgen Niclasen, um landsstýrismaðurin kundi greiða nærri frá fiskiskapi eftir ansjósum í føroyskum øki. Hann spurdi, hvar hesin fiskiskapur fer fram, og hvussu nógv russar fáa av ansjósum.

Ikki ansjósir, men prikkafiskur

Jørgen Niclasen vísti í svari sínum á, at russar í nøkur ár hava havt eina ávísa nøgd av hjáveiðu, ið teir hava uppgivið sum ansjósir. Hetta hevur verið sum hjáveiða uppi í svartkjaftaveiðini.

– Fiskiveiðieftirlitið hevur tikið nakrar av hesum fiskum við til lands, so Fiskirannsóknarstovan kundi staðfesta, hvat fiskaslag talan er um. Stovnurin er komin fram til, at talan er ikki um ansjósir, men prikkafisk, sum hann verður róptur.

Í svari sínum segði Jørgen, at prikkafiskur er stimafiskur, sum finst kring oyggjarnar. Eini 4-5 sløg eru av hesum fiski undir Føroyum, og sambært Fiskirannsóknarstovuni er fiskurin mest sunnanfyri, uttanfyri landgrunnakantarnar á einum dýpi, sum er millum 150-250 metrar.

– Tær kanningar, sum Fiskiveiðieftirlitið hevur gjørt umborð á svartkjaftaskipum, bæði føroyskum skipum og skipum úr øðrum londum, hava ikki víst nakra hjáveiði av prikkafiski. Sostatt bendir nógv á, at russar hava funnið fram til, hvussu fiskurin skal fiskast og hagreiðast.

Jørgen segði, at í 1999 vórðu fiskað 2000 tons av prikkafiski, somuleiðis 2000 tons í ár 2000, og í 2001 vórðu fiskað 3000 tons. Tað eru bara russar, sum hava fiskað henda fiskin.

– Higartil í ár hava russar fiskað heili 7000 tons! segði landsstýrismaðurin.

Hann segði, at kanningar hjá Fiskiveiðieftirlitinum hava eisini víst, at tá ið russar fáa henda fiskin, eru ofta eini 20-30 tons í hvørjum háli. Bestu mánaðirnar hava teir fiska yvir 2.000 tons av prikkafiski.

Við í samráðingarnar

Landsstýrismaðurin segði, at russiski fiskiskapurin eftir prikkafiski er nú so týðandi at hetta verður tikið upp í samráðingunum við russar næstu ferð.

– Higartil hevur fiskurin verið roknaður sum hjáveiða í svartkjaftafiskiskapinum og er tískil roknaður av samlaðu kvotuni. Tað er nú nógv, sum tíðir upp á, at fiskiskapurin eftir prikkafiski kann gerast munandi, og hetta er neyðugt at hava við, nú svartkjaftafiskiskapurin verður avmarkaður enn meira.

Jørgen vísti á, at Fiskirannsóknarstovan hevur ikki gjørt royndir eftir hesum prikkafiski, men sambært stovninum gera íslendingar nú royndir.

Í Íslandi verður prikkafiskur nýttur til mjølframleiðslu.

– Ætlanin hjá okkum er at gera royndir, men slíkar royndir eru kostnaðarmiklar. Tí vóna vit, at uppisjóvarvinnan vil vera við, bæði praktiskt og ikki minst peningaligi, tí veiðan eftir hesum fiskaslagi kann jú sum frá líður gerast eitt gott íkast hjá uppisjóarflotanum, segði Jørgen Niclasen í svari sínum til Hendrik Old.